# Norðís stongir eisini

**Í gjár kom fram, at tað er stórur vandi fyri, at Maru Seafood í nærmastu framtíð fer í gjaldsteðg. Hetta hevur við sær, at Kósin í Klaksvík stongir mánadagin. Men Norðís á Eiði er eisini undir Maru, og stongir tískil eisini mánadagin. Sostatt eru 40 fólk, ið starvast á Eiði, sum heldur ikki sleppa til verka mánadagin**

VINNULÍV

*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Í gjár kom fram, at tey umleið 170 fólkini, ið arbeiða á Kósini í Klaksvík ikki sleppa til arbeiðis mánadagin. At Jóhan Páll Joensen arbeiðir við eini samlaðari loysn fyri Maru Seafood, men at hann ikki er bjartskygdur. So tað kundi væl hent seg, at øll umleið 300 fólkini í Maru samtakinum missa arbeiðið í nærmastu framtíð.

Orsøkin til stóru trupulleikarnar, er, at allir partrolararnir hjá Maru fóru undir hamaran í fyrradagin, og tí fæst ikki nokk av ráðvøru til samtakið.



*Tað er seinasti arbeiðsdagur hjá hesum fólkunum á Norðís á Eiði. Um tað - innan eina viku - ikki eydnast Jóhan Pálli Joensen at bjarga Maru Seafood*

*Mynd: Tróndur Kruse*

### Norðís

Hóast Norðís ikki beinleiðis er tengt at skipunum, ið fóru á tvang í fyrradagin, sum bankin keypti, so er Maru somikið samantvinnað, at alt virksemi hjá Maru gevst, um Jóhan Páll Joensen ikki megnar at finna eina samlaða loysn fyri samtakið.

- Fíggingin liggur í høvuðsfelagnum, og fáa vit ikki eina loysn, so steðgar alt virksemi hjá felagnum. Vit fáa ikki nóg stórt útboð, um skipini ikki eru, og tí hava vit eina trupulleika. Tað vil siga, at Norðís eisini steðgar í dag. Sostatt sleppur ongin til arbeiðis mánadagin, sigur Jóhan Páll Joensen.

### Samráðast

Í løtuni samráðast Føroya Banki og Maru um eina samlaða loysn fyri at halda virkseminum í gongd, men sambært Jóhan Pálli Joensen, er útlitini ikki nógv betri eftir fyrsta fundin, enn tey vóru áðrenn fundin.

- Vit líkasum kritaðu banan upp í gjár. Vit fara at forhandla víðari í næstu viku, men tað verður als ikki sum at siga tað at finna eina loysn. Alt má ganga upp í eina hægri eind, so vónirnar eru ikki so øgiliga góðar, greiðir Jóhan Páll Joensen frá.

### Skipini hava skuldina

Maru Seafood hevur átt Kósina og partrolararnar í trý ár, og Jóhan Páll Joensen metir, at skipini eru trupulleikin.

- Skipini hava kvett heysin av okkum. Virkini hava yvirskot í ár, men skipini hava ikki klára seg. Hevði alt verið, sum tað átti at vera, so hevði tað gingið hjá okkum, men skipini hava ikki klára seg nóg væl, fortelur Jóhan Páll Joensen. Sum leggur afturat, at hann trýr uppá Maru, tí annars hevði hann ikki roynt at bjarga samtakinum.

Línuskipini, Grani og Fugltúgvan, hoyra eisini til samtakið, men hesi koma eru úti, og koma at vera í drift í eina tíð afturat, sambært Jóhan Pálli Joensen.

# Ein katastrofa fyri bygdina

**Pól Juul Festirstein, formaður í Eiðis arbeiðsmannafelag, sum hevur 40 limir, ið starvast á Norðís. Hann metir tað vera eina katastrofu fyri bygdina, um virkið stongir**

VINNULÍV

*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

40 fólk arbeiða á Norðís á Eiði. Ongin av teimum sleppur til arbeiðis mánadagin, og tað harmar formannin í Eiðis arbeiðsmannafelag.

- Tað er ein katastrofa fyri bygdina, um virkið stongir. Tað minkar um moralin í bygdini og nógv koma í eina trongstøðu av tí. Tað er í veruleikanum tað keðiligasta, sum kann henda fyri bygdina. Norðís er største arbeiðsplássið, og tað kemur at ávirka bygdina heilt nógv, sigur formaðurin

### Harmast um skipanina

Pól Juul Festirstein metir tað vera rættiliga óheppið, at alt virksemi hjá Maru Seafood er samantvinnað.

- Mann hevur havt hasa skipanina, har skip og virki hanga saman, fyrr. Tað fór mann burtur frá, tí mann ikki metti tað vera gott, men seinastu árini er mann farin aftur til tað, fyri at tryggja sær ráðvøru, sigur Pól Juul Festirstein, sum metir tað vera óheppið

### Ikki nógv at gera

Formaðurin í Eiðis arbeiðsmannafelag metir ikki, at arbeiðsmannafelagið kann gera nógv fyri fólkini á virkinum.

- Vit hava havt kreppu fyrr, og nú sær út til, at okkurt líknandi er ávegis. Tað er bara ikki so nógv vit kunnu gera við tað, uttan at hjálpa fólkunum og royna at halda moralinum uppi. Annars mugu fólkini bara royna at koma víðari, men so er sjálvandi ALS eisini, ið kann hjálpa fólkunum, sigur Pól Juul Festirstein, sum leggur afturat, at hann sjálvandi vónar, at Maru megnar at finna eina loysn.

# Stuðla ikki privatum

**Hóast landið lat Smyril Line stuðul, metir Jacob Vestergaard, fiskimálaráðharri, ikki, at tað verður gjørt í hesum føri. Øll støðan argar Ingeborg Vinther, forkvinnu í Føroya arbeiðarafelag**

VINNULÍV

*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Ingeborg Vinther er á sama hátt, sum Pól Juul Festirstein sera hørm um støðuna, og argast inn á landið fyri teir hátt at handfara støðuna.

- Tað ber ikki til, at landið fer inn at bjarga einum privatum reiðaríi. Sjálvandi koma onnur aftaná, tað er sum ein skrúva uttan enda, men tá tað eru tey veikastu í samfelagnum, ið vera rakt, so gera politikararnir onki fyri at hjálpa, sigur Ingeborg Vinther. Hon leggur afturat, at tað er forferdiligt, at hvørja ferð tað ikki gongur sum tað skal í landinum, so vera tey tímaløntu rakt fyrst.

Jacob Vestergaard, fiskimálaráðharri, metir hinvegin ikki, at mann skal fara inn at stuðla privatum vinnulívið.

- Vit hava í 80'unum sæð, hvussu tað ávirkar vinnulívið, um landið fer inn at stuðla, og eg eri av tí sannføring, at marknaðarkreftirnar sjálvar finna útav tí. Virkini standa jú har, og er onkur, sum sær tað sum eina góða íløgu, so skal viðkomandi nokk gera tað, fortelur Jacob Vestergaard. Sum eisini heldur, at tað kann vera, at mann í framtíðini verður noyddur til at gera onkur inntriv í føroyska vinnulívið, men at Smyril Line var eitt felag, mann metti vera so umráðandi fyri landið, at tað mátti bjargast.

Jacob Vestergaard metir eisini at virkini nokk skulu koma í gongd aftur, uttan hjálp frá landinum.

- Landið skal skapa karmarnar, og so skulu teir privatu nokk gera tað, sum loysir seg best fyri samfelagið, metir fiskimálaráðharrin.